

## Nú nærkast hjá Rio

Sterki enski verjuspælarin Rio Ferdinand hevur havt eitt keðiligt kappingarár higartil. Hann hevur verið plágaður av skaðum, og tað hevur sæst aftur á vøllinum, har hann ikki hevur staðið sterkur í myndini. Seinastu vikurnar hevur Manchester United tikið avleiðingarnar av hesum og hevur latið Ferdinand fingið frið at koma fyri seg aftur. Og líkt er til, at Ferdiand verður aftur á vøllinum um einar tvær vikur.

# Mjølnir heldur fram

**Einki røkist fyri, at kappingin í Eik-liguni hjá monnum verður stórvegis meira spennandi, tí Mjølnir sær út til at renna undan hinum við somu ferð sum undan jóla- og nýggjársssteðginum**




Hilmar Jan Hansen



Mestsum alt kappingarárið higartil hava flogbóltsmenninir úr Klaksvík verið dominerandi. Onga løtu hava teir latið oddasessin frá sær, og sjálvt ikki tað, at stigini eru koyrd í helvt, sær út til at darva teimum stórvegis.

Í løtuni hava teir spælt ein dyst meira enn SÍ, sum í løtuni er argasti kappingarneytin, so tey fimm stigini á muni kunnu mikukvøldið gerast til trý, um SÍ – sum væntast má – tá vinnur á ÍF. Men framvegis nertir tað lítið og einki oddastøðuna hjá Mjølnir.

### Fleyr-Mjølnir 2-3

(23-25, 21-25, 25-18, 25-13, 12-15)

Í gjár tók Mjølnir í Gundadalshøllini í Havn ímóti Mjølnir, og hetta var eitt slag av seinasta útkalli, skuldi Mjølnir takast. Fleyr hevur mangan bitið frá sær í vetur, men tað hevur kortini verið sermerkt fyri spælið hjá havnarfelagnum, at tá tað veruliga ráddi um, rakk ikki á mál.

So gjørdist eisini í gjár. Hóast Fleyr rann undan í teimum báðum fyrstu settunum, eydnaðist Mjølnir at vinna tey og koma á odda 2-0. Men í triðja og fjórða setti kostaði tað klaksvíkingum, at teir í øllum fýra settunum vóru seinir í gongd, tí hesar báðar ferðirnar eydnaðist teimum ikki at fáa Fleyr aftur.

Sostatt skuldi alt avgerast í fimta setti, har Mjølnir fekk góða byrjan og kom á odda 4-1, men so ikki megnaði at halda leiðsluna kortini. Liðini fylgdust uppeftir, men tá tað bleiv 13-12 til Fleyr – og síðani umbóltur, ið Mjølnir vann – fingu klaksvíkingar í evstu løtu tikið írestandi stigini og sigurin.

Eitt sindur heppið, kanska, men hepni fylgir sum oftast teimum góðu. Og sjálvt um Mjølnir ikki vísti sítt besta spæl í gjár, rakk tað væl og virðiligа til at verja oddasessin.

# TB og B68 bjóða av

**Í Mjølnir-kappingini hjá teimum eldru fara menninir hjá TB og kvinnurnar hjá B68 at kappast við liðini í Eik-liguni**




Hilmar Jan Hansen

Um vikuskiftið verður árliga Mjølnir-kappingin í Klaksvík, og mest spennandi spurningurin er, hvørji av Eik-liguliðunum hjá kvinnum og monnum megna at spæla seg í steypafinalurnar. Undan hesum er greitt, at SÍ hjá kvinnum og Mjølnir hjá monnum hava vunnið sær finalupláss, men eftir er so at finna hinar báðar finalistarnar.

Í Eik-liguni hjá kvinnum eru tveir bólkar, har TB, ÍF og Dráttur eru í øðrum og Mjølnir, B68, KÍF og Fleyr eru í hinum. Merkisvert er her, at B68, sum annars er oddalið í næstbestu deildini, fer at royna kreftir ímóti teimum bestu kvinnuliðunum. Hjá kvinnunum verður annars spælt soleiðis, at tvey tey bestu liðini í hvørjum bólki koma í hálvfinalurnar, og síðani enda vinnararnir av teimum báðum hálvfinalunum í sjálvari finaluni.

Hjá monnunum spæla øll liðini í einum bólki, og tey eru SÍ, TB, ÍF og Fleyr, og so verður finalan spæld millum tey bæði bestu liðini. Eisini her er oddaliðið í næstbestu deildini við, og nú sleppa menninir hjá TB at royna seg millum tey bestu.

Í Mjølnir-kappingini verður spælt best av trimum settum, har tað – um dysturin ikki endar 2-0 – í triðja setti verður spælt upp til 15. Einasta undantakið, har spælt verður best av fimm settum, er í finalunum í teimum báðum bestu deildunum, sum ikki verða fyrr enn sunnudagin.

### Í hinum deildunum er kappingin annars skipað soleiðis:

**1. deild kvinnur**
**Bólkur A:** Fleyr A, Mjølnir, SÍ
**Bólkur B:** KÍF, Dráttur Fleyr B
Tvey tey bestu í hvørjum bólki í hálvfinalur

**1. deild, menn**
**Bólkur A:** Fleyr, Dráttur, B68
**Bólkur B:** Mjølnir, SÍ, Nøvan
Tvey tey bestu í hvørjum bólki í hálvfinalur

**2. deild, kvinnur**
**Bólkur A:** KÍF, Nøvan B, Mjølnir A, ÍF
**Bólkur B:** Nøvan A, B68 B, Mjølnir B, Fleyr
**Bólkur C:** B68 A, SÍ, Mjølnir C
Tvey tey bestu í hvørjum bólki víðari til endaspæl

**2. deild, menn**
B68, Víkingur, Mjølnir, ÍF, Nøvan
Nummar eitt í bólkinum er vinnari